


Ford fór skeivur

Demokratiska valevnið til amerikanska forsetavalið í heyst Jimmy Carter, hevur fingið nýtt lot í seglini, eftir at mótvalevni hansara, Gerald Ford, forseti, gjørdi fleiri mistøk í tí seinasta sjónvarpsdystinum millum bæði valevnini. Evnið í hesum dystinum var uttanríkispolitikkur og verjupolitikkur.

Fyrsta mistakið, sum forsetin gjørdi, var, tá hann segði, at Sovjetsamveldið ikki stýrir londunum í Eysturevuropa. Gerald Ford mistók seg eisini, tá hann gav lyfti um, at handilsmálaráðið beint eftir sjónvarpssendingina fór at almannakunngera nøvnini á amerikanskum handilsfyritøkum, sum luttaka í arabiska handilsboykottinum ímóti Israel.

Ovfarnir siggjarar

Sjónvarpssiggjarnir vórðu ovfarnir, tá Ford tóktist vera so væl vitandi um, í hvønn mun Sovjetsamveldið stýrir londunum í Eystureuropa. Forsetin vaðaði longur út, tá ein sjónvarpsmaður spurdi hann, um hann mundi hava hoyrt rætt.

Jimmy Carter kundi ikki halda sær, tá hann gjørdist sannførdur um, at eingin eystureuropeari í USA kundi vera samdur við forsetan í óvitan hansara.

— Fólkið í Jugoslavia, Rumenia og í Pólland siga seg ikki verða stýrd av russum, helt ford.

Hjálparmenn Carters vóru av sonnum fegnir um mistøkini, sum Gerald Ford gjørdi í hesum sjónvarpsdystinum, og tað ljóðar, at teir fara at nýta hesi mistøkini í valstríðnum heilt upp undir valdagin, sum verður 2. november.

— Tað ljóðar heilt ótrúligt. Mistøk Fords prógva, at tann uttanríkispolitiska vitan, sum forsetin hevur hildið seg havt, er heilt burturvið, segði ein av hjálparmonnum Carters, Stuart Eizenstat.

Hjálparmenn Fords royndu afturímóti at greiða sjónvarpsmonnunum frá, at tað, sum forsetin veruliga hevði meint, var, at USA ikki vildi lata Sovjetsamveldið rættin til at stýra Eysturevropa.

Óvitandi býttlingur

Fyrrverandi amerikanski sendiharrin í Warszawa, John Gronouski, segði aftan á sjónvarpsdystin, at Ford við sínum úttalilsum um Eystureuropa hevði víst so stóra óvitan um uttanríkispolitikk sum eingin annar amerikanskur forseti hevur gjørt.

— Um Ford veruliga heldur, at Rumenia og Pólland eru óheftar tjóðir, uttan uppilegging úr Russlandi, so er hann ein óvitandi býttlingur, helt John Gronouski.

Óheppin løta

Mistøkini í sjónvarpsdystinum vórðu gjørd í einari óhepnari løtu fyri Ford. Stutt frammanundan hevði landbúnaðarmálaráðharrin, Earl Butz, avgjørt at leggja frá sær, eftir at hava sagt nakað niðursetandi um litta fólkið í USA. Og Ford varð samstundis fyri nógvum atfinningum, tí hann ikki sjálvur hevði koyrt ráðharran frá.

Bræv frá politiskum fanga í Spania:

— Fangavørðarnir hava givið mær mein fyri lívið

Sólin skínur í Spania. Men skuggar síggjast eisini á himlinum. Aftan fyri ta grunnskygdu ferðamannafasaduna verða landsins trupulleikar fjaldir av yvirgangi ímóti ósekum fólki, sum verða fongslað, uttan at koma fyri rættin frammanundan

Rópini frá teimum sakleysu fongslaðu hava fingið menninar aftan fyri demokratisku hugsjónina í Vesturheiminum til at umhugsa seg.

Hóast deyða Francos, og hóast stig eru tikin til meiri demokratisering í Spania sita mangar lagnur í sponskum fongslum. Hetta eru fólk, hvørs einasta brotsgerð er at hava aðra hugsan enn hana hjá valdsharrunum.

Gera av við hana

Í bókini, Dagbók og brøv úr fongslinum, fær lesarin eina váttan um atburðin hjá fangavørðunum ímóti teimum fongslaðu.

— Beint eftir at teir høvdu víst mær til høvuðsskrivstovuna hjá trygdarpolitinum, varð eg læst inni í einum kjallararúmi — burtur frá øllum hinum.

Teir ungu, sum skuldu taka sær av henni, háðaðu hana við skemdarorðum sum t.d. »Tú skalt skjótast!«

Tað skuldi gerast av við hana. Ongar avhoyringar, bara fáa hana av vegnum.

Eva Forest varð síðani víst inn í eitt óhugnaligt rúm. Eitt veikt ljós úr loftinum forðaði henni í at kenna teir 8—10 menninar, sum skuldu í holtur við hana.

»Drápskvinna, skøkja, kommunistur!«

Skemdarorðini regnaðu niður yvir hana, sum ein byrjan til sálarligu niðurbrótingina.

— Teir noyddu meg at standa aftur at múrinum við høvdinum afturá, opnum eygum, fótunum saman, og teir hóttu við at knúsa høvdið, um eg rørdi tað.

— Rørir tú teg, bróta vit ryggin á tær. Spýr tú, má tú sjálv sleikja spýggjuna uppaftur!



Hoyknaði

Men beinini á Evu Forest orkaðu ikki at bera hana, og hon hoyknaði og fall í óvit.

— Tá eg kom til mín sjálvs aftur helt ein í beinið á mær, meðan ein annar oysti eina spann av vatni í høvdið. Teir royndu at fáa meg aftur á føtur, men eg hoyknaði niður yvir eitt borð.

— Heldur tú fram við hesum spælinum, verður tú tikin av døgum, hóttu teir.

Ein kvinnuligur lækni kom innar í rúmið, kannaði pulsin og flenti: Hjartað slær sum tað eigur, segði hon. Tit kunnu halda fram.

Eva forest hevur fingið mein fyri lívið. Og fleiri av hinum fangunum hava eisini fingið mein.

Higartil hava allar royndir at fáa hana og aðrar fangar leysar miseydnast.

Niðurundirkomin

Ein teirra er tann 48 ára gamla Eva Forest, sum undir harðskapi varð tikin 16. september 1974 av tí nógv umrødda trygdarpolitinum í Spania.

Í dag er hon bæði likamliga og sálarliga niðurundirkomin av fongsulsuppihaldinum í Yeseriasfongslinum í Madrid. Teir leiðandi geva henni ongar møguleikar.

Hon hevur m.a. verið í sambandi við tann forbodna kommunistaflokkin og ta demokratisku kvinnurørsluna, eins og hon hevur víst samhuga við fleiri andstøðubólkum, m.a. ta baskisku rørsluna fyri frælsi og sosialismu, ETA.

Eva Forest er gift við rithøvundanum, Alfons Sastre, sum býr í útlegd í Fraklandi.

Norðoya Javnaðarfelag

3. uppstillingarfundur til býráðsvalið verður á Klaksvíkar Sjómansheimi hóskvøldið kl. 20.

Nevndin

Heldur tú ikki **sosialin**